Almanna- og mentamálaráðið

Dagfesting:	14. februar 2023
Mál nr.:	23/02739
Málsviðgjørt:	KÁ/JEB
Ummælistíð:	27. januar 2023 til 31. januar 2023
Eftirkannað:	30.01.2023

Uppskot til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um at byggja eitt búheim og umlættingarheim í Tórshavn til børn og ung við autismu
(Øktar útreiðslur til verkætlanina)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 60 frá 30. apríl 2018 um at byggja eitt búheim og umlættingarheim í Tórshavn til børn og ung við autismu, sum broytt við løgtingslóg nr. 26 frá 26. mars 2021 verður í § 1, stk. 2 “39 mió. kr.” broytt til: “43 mió. kr.”

§ 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

1.1. Orsakir til uppskotið
Í sambandi við byggingina av bú- og umlættingarheiminum á Argjum til børn og ung við autismu hevur Landsverk nú staðfest, at tað eru øktar útreiðslur í sambandi við byggingina, sum eru neyðugar at leggja upp fyri. Eitt nú er neyðugt við einum stuðlamúri omanfyri bygningin samstundis sum nýggj krøv um trygd móti brandi eru komin frá Tórshavnar kommunu, sum hava øktar útreiðslur við sær. Harumframt er neyðugt at hækka játtanina vegna óvanligar príshækkingar og longda byggitíð.

Verkætlanin hevur verið gjøgnum nøkur spariumfør, og mett verður ikki, at tað ber til at tillaga verkætlanina meira fíggjarliga, uttan so at tað fær avleiðingar fyri virksemið á stovninum.

1.2. Galdandi lóggáva
Løgtingslóg nr. 60 frá 30. apríl 2018, sum broytt við løgtingslóg nr. 26 frá 26. mars 2021 heimilaði landsstýrismanninum at byggja eitt búheim og umlættingarheim til børn og ung við autismu fyri í mesta lagi 39 mió. kr.

Byggingin fevnir um tríggjar eindir: eina búfólkaeind við seks búplássum, eina umlættingareind við seks umlættingarplássum og eitt dagtilboð til áleið 16 borgarar.

1.3. Endamálið við uppskotinum
Endamálið við uppskotinum er at hækka fíggjarkarmin, soleiðis at heimið til børn og ung við autismu kann byggjast samsvarandi nýggju mettu kostnaðarmetingini. Talan er um sama verklag, sum tá løgtingslógin varð samtykt í 2018.

1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum
Heimildin til verkætlanina er í løgtingslóg nr. 60 frá 30. apríl 2018 um at byggja eitt búheim og umlættingarheim í Tórshavn til børn og ung við autismu, sum broytt við løgtingslóg nr. 26 frá 26. mars 2021.

Verkætlanin varð av fyrstani tíð boðin út í januar 2020, og lisitatión var í februar 2020. Kostnaðarmetingin, tá verkætlanin varð boðin út, var á 41 mió. kr. Innkomnu tilboðini vóru munandi hægri enn kostnaðarmetingin, og lægsta tilboðið, saman við øðrum útreiðslum, var omanfyri 56 mió. kr. Lisitatiónin varð havnað og bygningurin umprosjekteraður fyri at gera sparingar, tó uttan at tað gekk út yvir funktiónirnar og virksemið í heiminum.

Umprosjekteraða høvuðsprosjektið varð boðið út alment í sjey arbeiðstøkum í desember 2020, og sambært lægsta tilboðnum, umframt aðrar kostnaðir, varð neyðugt at hækka fíggjarligu heimildina í verklagslógini úr 29 mió. kr. uppi í 39 mió. kr.

Í sambandi við byggingina hava verið nøkur viðurskifti, sum eru løgst aftrat, sum vitan ikki var um, áðrenn gongd varð sett á byggingina. Eisini hava verið óvanligar príshækkingar á so at siga øllum tilfari og innbúgvi umframt, sum víst er á undir punkt 1.1., at nýggj krøv eru komin frá Tórshavnar kommunu í sambandi við trygd móti brandi.

Við at broyta løgtingslógina, soleiðis at fíggjarkarmurin verður hækkaður til at verða í mesta lagi 43 mió. kr., verður mett, at heimið kann gerast liðugt.

Útreiðslan verður fíggjað innanfyri játtanina á høvuðskontu 12.21.6.02. Bústovnar (løgujáttan). Í fíggjarlógaruppskotinum fyri 2023, ið fall burtur, er lagt upp fyri, at 8.450 tús. kr. kunnu brúkast til fyrireiking og aðrar verkætlanir, og tí er rúm fyri í játtanarkarminum at halda útreiðsluna, treytað av, at upphæddin ikki verður hægri enn mett. Játtanin til verkætlanina hækkar úr 39 mió. kr. í 43 mió. kr. um Løgtingið tekur undir við lógaruppskotinum.

Heimið verður sambært nýggjastu tíðarætlanina liðugt bygt í vár.

1.5. Ummæli og ummælisskjal

Av tí at broytingaruppskotið einans snýr seg um at hækka fíggjarligu heimildina, hevur broytingaruppskotið bara verið til ummælis hjá Fíggjarmálaráðnum.

Fíggjarmálaráðið hevur ikki viðmerkingar til, at verkætlanin er vorðin dýrari.

Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Uppskotið hevur við sær, at verkætlanin verður 4. mió. kr. dýrari fyri landið, meðan uppskotið hevur ikki fíggjarligar avleiðingar fyri Tórshavnar kommunu, har bygningurin verður staðsettur.

2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Lógaruppskotið hevur ikki umsitingarligar avleiðingar fyri land ella kommunur.

2.3. Avleiðingar fyri vinnuna
Lógaruppskotið hevur ikki aðrar avleiðingar fyri byggivinnuna enn upprunauppskotið.

2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri umhvørvið.

2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar.

2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar.

2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Ongir millumtjóðasáttmálar eru á økinum.

2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar
Lógaruppskotið stuðlar undir ST-sáttmálan um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek. Sáttmálin varð settur í gildi fyri Føroyar tann 23. august 2009.

Sambært grein 19 í breksáttmálanum viðurkenna limalondini rættin hjá øllum fólkum, ið bera brek, at liva í samfelagnum á jøvnum føti við onnur og við somu valmøguleikum. Limalondini skulu viðurkenna at fólk, ið bera brek, sleppa at velja sær bústað og velja hvar og saman við hvørjum, tey vilja liva.

Sambært grein 28 í breksáttmálanum viðurkenna limalondini, at fólk, ið bera brek, hava rætt til nøktandi lívskor og tískil eisini rætt til nóg góðan bústað. Somuleiðis viðurkenna limalondini, at fólk, ið bera brek, sleppa upp í almenn bústaðartiltøk.

Lógaruppskotið er eitt stig á leiðini at liva upp til hesar viðurkendu ásetingarnar.

2.9. Markaforðingar
Ongar markaforðingar eru á økinum.

2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv
Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um revsing, útpanting, sektir ella onnur størri inntriv.

2.11. Skattir og avgjøld
Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um skattir ella avgjøld.

2.12. Gjøld
Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um gjøld.

2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?
Lógaruppskotið áleggur ikki fólki skyldur.

2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?
Lógaruppskotið heimilar landsstýrismanninum at nýta upp í 43 mió. kr. til at byggja eitt búheim og umlættingarheim.

2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?
Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?
Lógaruppskotið hevur ikki aðrar avleiðingar.

2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

	Fyri landið ella landsmyndug-leikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss ella øki í landinum	Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Ja
Umsitingarligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei

Umhvørvisligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Sosialar avleiðingar			Ja	Ja	

3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

Til § 1
Heimildin at byggja eitt búheim og umlættingarheim í Tórshavn til børn og ung við autismu fyri mesta lagi 39 mió. kr. verður broytt til 43 mió. kr.

Til § 2
Talan er um gildiskomuásetingna.

Almanna- og mentamálaráðið, 14. februar 2023

Sirið Stenberg
landsstýrismaður

/ Eyðun Mohr Hansen

Yvirlit yvir fylgiskjøl:
Fylgiskjal 1: Fylgiskjal frá Landsverk
Fylgiskjal 2: Hoyringssvar Fíggjarmálaráðið